Undirvísingartilfar
At ferðast á netinum

# Trygg loyniorð

*Grundspurningur:*

**Hvussu tryggjar eitt gott loyniorð tínar privatu upplýsingar**

# Trygg loyniorð – Inngangur

Hetta heftið er nummar trý í røðini av teimum seks tættunum til undirvísingartilfarið *At ferðast á netinum* og er til tín sum lærari, ið vil undirvísa og vegleiða næmingum at ferðast trygt á netinum.

At reika á netinum er ein natúrligur partur av gerandisdegnum hjá flest øllum, bæði børnum og vaksnum. Hetta setur krøv til skilagóðan atburð, og hvussu vit tryggja okkara privatlív, og hetta er nakað sum tú, sum lærari, kann hjálpa við.

Ein væl tilrættisløgd undirvísingargongd í ymiskum lærugreinum, har næmingurin fer í dýpdina saman við sínum floksfeløgum tryggjar, at evnið verður tikið í álvara og fær neyðuga viðgerð.

Somuleiðis er sera umráðandi, at foreldrini hava ein virknan leiklut. Fyri hvørt evni er ein heimasetningur, har foreldrini og barnið í felag viðgera ymiskar spurningar, ið stinga seg upp í kjalarvørrinum av kunningartøknini.

Ein slík skipað tilgongd er – saman við foreldrafundum og øðrum átøkum í SSP – við til at menta okkara børn og ungu til at gerast skilagóðir og vandaligir brúkarar, tá ið teir reika á netinum og brúka mongu pallarnir og samskiftishættirnar har.

**Ábyrgd:** SSP-ráðgevingin.
**Útgivið:** 2017/2022.
**Málbólkur:** Miðdeild 4.-6. flokkur.
**Lærugrein:** Støddfrøði.
**Umbrotið, prentað og heft:** Føroyaprent.
**Samband:** Um tú sum lærari, foreldur ella fakfólk hevur spurningar ella tørv á vegleiðing til tilfarið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.

SSP-ráðgevingin
R. C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
Tel. 30 24 80


















# Undirvísingargongd

| | |
|---|---|
| Skúlaár | |
| Skúli | |
| Floksheiti | |
| Floksstig | Miðdeild 4.-6. flokkur |
| Lærugrein | Støddfrøði. |
| Lærari | |

| | |
|---|---|
| Heiti | At ferðast á netinum – Trygg loyniorð |

| | |
|---|---|
| Førleikamál | **Støðisførleikar:**<br>At virða, at samskifta og at kanna.<br><br>**Fakligir førleikar**<br>Samskifti og spurdómar<br>• At lýsa støddfrøðiligar mannagongdir og greiða frá teimum, har í millum at lýsa egin uppskot til loysnir.<br>• At meta um úrslit.<br>• At arbeiða saman um greiðsluevni, sum hava í sær fleiri loysnir. |
| Tímatal | Undirvísingartímar tilsamans umleið 20.<br>Til evnið trygg loyniorð skulu nýtast 1-2 dupulttímar í støddfrøði. |
| Undirvsingarmiðlar | Tilfar, sum er gjørt til hetta undirvísingarevni, næmingaskjøl og heimasetningur. |
| Arbeiðshættir | Floksundirvísing, kjak, skrivligar uppgávur, bólkaarbeiði og møguliga gera næmingarnir skrivligt tilfar so sum plakatir. |

| | |
|---|---|
| Eftirmeting (sendast til SSP-ráðgevingina eftir útfylling) | Í hvønn mun eydnaðist undirvísingargongdin? |
| | Var tímatalið hóskandi? |
| | Var tilfarið hóskandi? |
| | Í hvønn mun náddu næmingarnir settum førleikamálum? |
| | Hvussu eydnaðust ymsu arbeiðshættirnir? |
| | Uppskot til broytingar |

## Grundspurningur:

Hvussu tryggjar eitt gott loyniorð tínar privatu upplýsingar?

## Samanumtikið:

Næmingar læra at gera trygg loyniorð, sum verja teirra upplýsingar, kontur og vangamyndir á netinum.

## Lærusetningur:

Næmingar læra, hvussu trygg loyniorð eru sett saman. Næmingar læra at gera trygg loyniorð.

## Fyrireiking:

Næmingar skulu hava avrit av *Næmingaskjal 1, 2 og 3* (síða 7, 8 og 9), tá komið verður til uppgávurnar. Pappír, litir, saks og lím. Skriva út *Heimasetningur* (síða 10), sum børnini fáa heim við til foreldrini.

### *Upphiting: 10 minuttir*

**Spyr næmingarnar:** Hvat gera vit, so vit tryggja okkum og teir lutir vit eiga? Her verður ikki hugsað um internetið, men okkara ting heima og her í skúlanum.

**Dømi:**
- Lás á skápinum.
- Lyklar til hús og íbúðir.
- Súkklulás, hjalslás.

**Spyr næmingarnar:** Nær nýta vit loyniorð?
- Til at logga á teldu/ipad/telefon.
- At logga á online kontur, so sum Facebook, Snapchat, Instagram, teldupost og tílíkt.

**Greið frá,** at loyniorð verja tínar online kontur, soleiðis at einki verður stolið haðani ella nýtt av øðrum. Tess eldri næmingarnir eru, tess meiri týdningarmikið er tað, at tey hava góð loyniorð.

Hesi hjálpa teimum at verja teirra sosialu profilar, nú tey eru ung, men seinni verða netbanki, online-keyp og atgongd til almennar skipanir eisini vard av hesum loyniorðum.

**Spyr næmingarnar:** Hvat halda tit kann henda, um onkur fær fatur á tykkara loyniorði?

**Dømi:**
- Tey sleppa til mínar online kontur.
- Tey kunnu stjala mínar pengar.
- Tey kunnu lata, sum um tey eru eg.
- Tey kunnu fáa vitan um meg, sum eg ikki vil, at onnur hava.

*Uppgáva 1: 10 minuttir*

# 8 góð ráð

## Gev næmingunum næmingaskjal 1

Gangi tey átta ráðini ígjøgnum í *Næmingaskjal 1* (síða 7), og latið næmingarnar greiða frá teimum ymsu ráðunum. Um teir ikki eru vísir í, hvat tey merkja, eru nakrar leiðbeiningar her:

1. **Bert foreldrini skulu vita tíni loyniorð.**
   Tú mást ongantíð siga nøkrum øðrum tíni loyniorð – heldur ikki besta vininum ella bestu vinkonuni. Tey kunnu av óvart deila orðið við onkran, ið brúkar tað til at lata sum um, tey eru tú. Tá kunnu tey gera stóran skaða við til dømis at happa onnur í tínum navni.

2. **Nýt bókstavir, tøl og tekin í loyniorðinum.**
   Um tú blandar tey, verður loyniorðið torførari at gita, tí møguleikarnir gerast so nógvir.

3. **Loyniorð eiga at vera minst 8 tekn long.**
   Tess færri teknini eru, tess lættari er tað hjá teldusníkum at sleppa ígjøgnum.

4. **Broyt loyniorð regluliga – umleið hálva hvørt ár.**
   Um tú ikki skiftir loyniorð javnan, hava teldusníkar góða tíð til at gita títt loyniorð.

5. **Ikki nýta loyniorð, ið eru løtt at gita, sum til dømis títt kelinavn ella navnið á tínum kelidjóri.**
   Fólk, ið kenna teg væl, kunnu gita hesi loyniorð, og tí eru tey ikki trygg.

6. **Ikki nýta privatar upplýsingar til loyniorð, sum til dømis títt telefonnummar.**
   Um tú nýtir títt navn ella føðingardagin í loyniorðinum, kunnu teldusníkar nýta hesar upplýsingar til at lata sum um, teir eru tú.

7. **Ikki sig ella vís øðrum tíni loyniorð – heldur ikki vinum.**
   Um tú og tín vinur verða óvinir, kann persónurin nýta títt loyniorð til at lesa og brúka tíni privatu boð og myndir. Tí er best, at bert tíni foreldur kenna tíni loyniorð.

8. **Ikki nýta eitt orð úr orðabókini einsamalt sum loyniorð.**
   Um tú nýtir eitt vanligt orð, ið er at finna í orðabókini, uttan nøkur tekin ella tøl, so kunnu teldusníkar lættliga nýta telduforrit til at gita títt loyniorð.

Lat næmingarnar gera hinar uppgávurnar í *Næmingaskjal 1* (síða 7)

*Uppgáva 2: 10 minuttir*

# Martin og Hanna

Bið næmingarnar lesa um Martin og Honnu *í Næmingaskjal 2* (síða 8).

**Spyr:** Hvat halda næmingarnir um loyniorðið hjá Martini?
- Valdi Martin eitt trygt loyniorð? Ja/Nei – grunda svarið.

**Svar:** Loyniorðið hjá Martini er alt ov lætt at gita hjá teimum, ið kenna Martin, og tí er tað ikki trygt.
- Hvørjum av góðu ráðunum fylgdi Martin?
- Hvørjum fylgdi Martin ikki?

**Spyr:** Hvat halda næmingarnir um loyniorðið hjá Honnu? Hanna er úr Klaksvík, ger fimleik, fødd í 2011 – loyniorð: HaKFim11
- Valdi Hanna eitt trygt loyniorð? Ja/Nei – grunda svarið.
- Hanna valdi eitt tryggari loyniorð, sum er partur av hennara navni (Ha), partur av fimleikafelagnum (KFim) og partur av hennara føðiári (11).

Lat næmingarnar meta um loyniorðið hjá Honnu.

**Spyr**, um hon valdi eitt tryggari loyniorð enn Martin.

**Svar:** Tað er tryggari, tí hon bert nýtti brot úr sínum privatu upplýsingum, tí hon hevði minst 8 tekn, sum bæði vóru tøl og bókstavir, og nakrir stavir vóru við stórum.

Lat næmingarnar gera trygg loyniorð til Honnu og Martin út frá teimum upplýsingum, vit hava um tey. Um tíð er til tað, skriva so nøkur boð upp á talvuna og spyr næmingarnar, um teir hava nøkur uppskot til, hvussu Hanna og Martin kunnu minnast síni loyniorð.

*Uppgáva 3: 15 minuttir*

# Trygg ella ótrygg loyniorð

Lat næmingarnar gera plakatir við góðum ráðum um, hvussu tú kanst tryggja tínar upplýsingar á netinum. Hesar plakatir kunnu teir antin taka heim við fyri soleiðis at geva ráðini víðari, ella kunnu plakatirnar hanga í flokshølinum til áminningar.

Velja tit tað seinna, kunnu næmingar fáa eitt ráð í part til teirra plakat.

Eru ikki stundir til hetta, ber til at gera uppgávurnar í *Næmingaskjali 3* (síða 9).

## *Samanumtøka: 5 minuttir*

Hesir spurningar kunnu nýtast til at meta um fataninina, næmingarnir hava fingið av grundleggjandi spurninginum: Hvussu tryggjar eitt gott loyniorð tínar privatu upplýsingar?

**Spyr:** Hvørji ráð eru til at taka, um tú vilt hava eitt trygt loyniorð? Hvørji ráð halda tit vera tey týdningarmestu?
- Eggja næmingunum til at minnast so nógv av teimum átta ráðunum, sum til ber, og bið teir siga, hví júst hetta eina ráðið er týdningarmikið.

**Spyr:** Hvørji ráð eru lættast at fylgja? Hvørji eru truplast?
- Bið næmingarnar greiða frá, hví tey halda tað tey halda.

**Spyr:** Hvussu kunnu vit minna okkum sjálv, aðrar næmingar, familju og onnur á, at vit skulu halda okkara loyniorð loynilig?

**At enda:** Minn næmingarnar á, at loyniorð tryggja teirra upplýsingar á netinum, at teldusníkar og samleikatjóvar arbeiða hart fyri at gita loyniorð, so teir kunnu fáa fatur á persónligum upplýsingum. Um næmingarnir gera góð loyniorð, verða tey trupul at gita.

*Næmingaskjal 1:*

# 8 góð ráð

1. **Bert foreldrini skulu vita tíni loyniorð.**
2. **Nýt bókstavir, tøl og tekin í loyniorðinum.**
3. **Loyniorð eiga at vera minst 8 tekn long.**
4. **Broyt loyniorð regluliga – umleið hálva hvørt ár.**
5. **Ikki nýta loyniorð, ið eru løtt at gita, sum til dømis títt kelinavn ella navnið á tínum kelidjóri.**
6. **Ikki nýta privatar upplýsingar til loyniorð, sum til dømis títt telefonnummar.**
7. **Ikki sig ella vís øðrum tíni loyniorð – heldur ikki vinum.**
8. **Ikki nýta eitt orð úr orðabókini einsamalt sum loyniorð.**

## *Uppgáva 1:*

Les setningarnar niðanfyri. Set antin „skalt" ella „skalt ikki" inn í setningin:

**a:** Tú ____________________ skifta loyniorð regluliga.

**b:** Tú ____________________ nýta eitt orð úr orðabókini einsamalt til loyniorð.

**c:** Tú ____________________ siga foreldrum tínum títt loyniorð.

**Minst til**

Loyniorð skulu ikki innihalda persónligar upplýsingar so sum:

**Títt fulla navn**
(fornavn og eftirnavn)
**Føðingardag**
**Bústað**
**Telefonnummar**
**P-tal**

## *Uppgáva 2:*

Summi av hesum loyniorðum eru trygg loyniorð, sum eru torfør at gita. Onnur eru ótrygg loyniorð, sum eru løtt at gita. Vel um hesi loyniorð eru trygg ella ótrygg

Er loyniorðið trygt ella ótrygt? Set ring um

| | | | |
|---|---|---|---|
| a | 3lski@sprka | Trygt | Ótrygt |
| b | F1ml31krular | Trygt | Ótrygt |
| c | Hanna11 | Trygt | Ótrygt |
| d | Martin271013 | Trygt | Ótrygt |

## *Uppgáva 3:*

Kristian hevur gjørt sær eitt loyniorð við navni og yndisítrótti. Loyniorðið er KristianSvimjing. Hví skuldi Kristian valt sær eitt annað loyniorð?

Vel besta svarið:

**a.** Tí tað er ov langt.
**b.** Tí tað inniheldur navnið hjá honum.
**c.** Tí tað inniheldur navnið hjá honum og eingi tekin ella tøl.

Uppgáva 1: a=skalt, b=skalt ikki, c=skalt Uppgáva 2: a= trygt, b=trygt, c=ótrygt, d=ótrygt Uppgáva 3: Rætta svarið er c. Loyniorðið er veikt, bæði tí tað inniheldur navnið hjá honum, men eisini tí tað ikki inniheldur tøl ella tekin. Slík loyniorð eru løtt at gita.

*Næmingaskjal 2:*

# Martin og Hanna

Les dømini um Martin og Honnu og svara spurningunum um teirra loyniorð.
Martin er føddur 27. oktober 2013 og býr í Leirvík. Hann hevur ein hamstrara, sum eitur „Blobb", og hann spælir við Víkingi. Martin hevur valt sær loyniorðið „viking".

Hevur hann valt sær eitt trygt loyniorð? Greið frá tínum svari:

Hanna er fødd 3. desember 2011, og hon býr í Klaksvík. Hon ger fimleik við Klaksvíkar Fimleikafelag, og hevur valt sær loyniorðið „HaKFim11"

Hevur hon valt sær eitt trygt loyniorð? Greið frá tínum svari:

Royn tú nú og ger nýggj loyniorð til Martin og Honnu. Brúka góðu ráðini.

Martin

Hanna

*Næmingaskjal 3:*

# Trygg ella ótrygg loyniorð

Ger eitt trygt og eitt ótrygt loyniorð fyri ein kendan søguligan persón. Bæði loyniorðini skulu vísa okkurt serstakt um júst hendan persón.

## Dømi:

- Søguligur persónur: Tróndur í Gøtu
- Trygt: GandR1F0 – (Gandakallur í Føroyum – síðsta tekinið er eitt „null")
- Ótrygt: Gotutrondur

Nýt góðu ráðini í *Næmingaskjal 1* (síða 7) til at hjálpa tær at gera tíni loyniorð:

Søguligur persónur: ____________________________________________

Um persónin: ____________________________________________

| Trygt loyniorð | Ótrygt loyniorð |
|---|---|
| | |

## Svara spurningunum við at seta kross:

1. Hvussu fanst tú upp á trygga loyniorðið?
   - ☐ Eg valdi okkurt, ið hevði við persónin at gera, men sum ikki var ov lætt.
   - ☐ Eg býtti nakrar bókstavir um við tøl.
   - ☐ Eg stytti orð.
   - ☐ Annað: ____________________________________________

2. Hvussu fanst tú upp á ótrygga loyniorðið?
   - ☐ Eg nýtti eingi tøl.
   - ☐ Eg nýtti orð um persónin, ið vóru løtt at gita.
   - ☐ Eg nýtti navn ella eyknevni á persóninum.
   - ☐ Annað: ____________________________________________

3. Hvussu kann ótrygga loyniorðið gerast tryggari uttan broyta tað alt ov nógv?
   - ☐ Stytt orð.
   - ☐ Tøl/tekin í staðin fyri bókstavir.
   - ☐ At stava orð við tølum (A-1, B-2, C-3, D-4...).
   - ☐ Annað: ____________________________________________

# Heimasetningur

*– saman við foreldrum/vaksnum*

# Góð loyniorð

Hvussu tryggja vit okkara privatu upplýsingar á netinum soleiðis, at vit kunnu verja tær fyri fólkum, ið ikki skulu hava atgongd til okkara tilfar?

Tað gera vit við at hava góð loyniorð til tær skipanir, ið hava upplýsingarnar í varðveitslu. Heima nýta vit lyklar til at læsa hurðar, vit hava lás á súkkluni ella á úthurðini, og í skúlanum hava vit kanska lás á skápinum. Loyniorð hava somu uppgávu sum lyklar.

1. **Bert foreldrini skulu vita tíni loyniorð.**
2. **Nýt bókstavir, tøl og tekin í loyniorðinum.**
3. **Loyniorð eiga at vera minst 8 tekn long.**
4. **Broyt loyniorð regluliga – umleið hálva hvørt ár.**
5. **Ikki nýta loyniorð, ið eru løtt at gita, sum til dømis títt kelinavnella navnið á tínum kelidjóri.**
6. **Ikki nýta privatar upplýsingar til loyniorð, sum til dømis títt telefonnummar.**
7. **Ikki sig ella vís øðrum tíni loyniorð – heldur ikki vinum.**
8. **Ikki nýta eitt orð úr orðabókini einsamalt sum loyniorð.**

### *Heimauppgáva 1 :*

- Tosið um, hvar vit nýta loyniorð.

### *Heimauppgáva 2:*

- Gerið eitt gott loyniorð til Tordis Jensen, sum er úr Miðvági og hevur føðingardag 23.11.2010.

Skúli
Sosialir myndugleikar
Politi

PRENT: FØROYAPRENT | SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705